Bjørg Hentze

Fra: Bogi Bendtsen <bb@sev.fo>
Sendt: 15. februar 2023 14:25
Til: Marjun Jacobsen
Cc: SEV; Hákun Djurhuus
Emne: SV: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort

Hey Marjun

SEV tekur undir við uppskotinum.

Ein viðmerking til uppskotið er at umráðandi er, at uppskotið í nøktandi hátt tekur hædd fyri brúkarum, ið ikki eru førir fyri at brúka KT-loysnir grundað á væntandi førleika á ymiskan hátt.

Vinarlig heilsan/Best Regards

Elfelagið SEV
Bogi Bendtsen
Deildarstjóri/CFO
Fartelefon/mobil +298 28 61 82
Telefon/telephone +298 34 68 11

Fra: Marjun Jacobsen <Marjun@fmr.fo>
Sendt: 24. januar 2023 13:38
Til: Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Almannamálaráðið <ammr@ammr.fo>; industry@industry.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Akstovan <Akstovan@akstovan.fo>; alzheimer@alzheimer.fo; samstarv@samstarv.org; megd@megd.fo; politi@politi.fo; kf@kf.fo; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Strandfaraskip Landsins <ssl@ssl.fo>; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; ft@ft.fo; SEV <sev@sev.fo>; Fjarskiftiseftirlitið <fjarskiftiseftirlitid@fjarskiftiseftirlitid.fo>; Skráseting <skr@skraseting.fo>; us <us@us.fo>; FSS - Føroya Stiftsstjórn <stift@kirkjan.fo>; Visit Faroe Islands <info@visitfaroeislands.com>; utoyggj@gmail.com
Emne: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort

Góðan dag,

Fíggjarmálaráðið hevur í dag sent uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort í almenna hoyring.

Samleikakortið verður saman við talgilda koyrikortinum partur av appini Skjáttan, sum Talgildu Føroyar í løtuni eru í gongd við at menna. Appin fer at hýsa almenn prógv og loyvi á einum stað.

Endamálið við lógaruppskotinum er at geva talgilda samleikakortinum neyðugu løgfrøðiligu karmarnar, samstundis sum samleikakortið við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda samleikakortið í Føroyum. Øll, sum hava Samleikan, kunnu eisini brúka samleikakortið. Aldursmarkið fyri at fáa Samleikan er 13 ár.

Samleikakortið fer eitt nú at kunna verða brúkt, tá ið tú skal prógva t.d. bústað fyri at fáa avsláttur frá Strandferðsluni ella skal prógva ein ávísan aldur fyri at keypa eina ávísa vøru.

Eftir ætlan verður samleikakortið liðugt ment og klárt at taka í brúk í vár.

Uppskotið er til hoyringar á hoyringsportalinum hjá Landsstýrinum fram til 21. februar 2023 og møguligar viðmerkingar skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 21. februar 2023.

Vinarliga / Kind regards

Marjun Jacobsen
fulltrúi
Fíggjarmálaráðið/ Ministry of Finance
☏: direct: +298 55 20 04
marjun@fmr.fo

ÁVARING: Hesin teldupostur kemur frá uttanhýsis sendara. Klikk bert á leinki og fylgiskjøl, um tú kennir sendaran og hevur álit á, at innihaldið er trygt.